Føroya
SOSIAL-DEMOKRATUR

Bladstjóri
P. KARBECK MOURITSEN

Prent:
A. ØSTER

SMÁTÍÐINDI

Føroyavinurin departementschefur Andreas Möller verður at halda summarloyvi sítt í Föroyum í summar.

Ríkisdagurin verður ikki at koma saman fyrr einaferð í septembirs, halda menn.

Av Tvöroyri:

Snarubátarnir hava verið ógvuliga væl fyri — á Tvöroyri eru teir komnir uppum 400 á bát.

Leivur Össursson varð so mannaður aftur — og fór til Bjarnaoynna í vikuni.

Rædulig ólukka hendi umborð á snarubáti hjá Sandvíkingum. 12 ára gamalur smádrongur hevði lagt seg at dúra inni í maskinrúminum, dettur og hövdið kemur í svinghjóli, eyga verður sligið út, hövuðskálin brotnar, so bert verður inná heilan. Drongurin varð fördur á sjúkrahúsið á Tvøroyri. Tessveri stóð, honum ikki til bata. Hann doyði ikki langa lötu aftaná.

Fámenningar fylla seg vestanfyri við sildafiski. Ber ikki til við linu, meðan stendur á hondum við snöri.

Sonur Einar Mohr og dóttir Richard Thomsen, Tova, giftist í Tvöroyri kirkju seinasta ónsdag.

Stavlagið — spunsaveggirnir — á tí nýggju bryggjugarðinum á Tvöroyri er nú liðugt og fylling stendur fyri at gera. Menn vænta henda bryggjugarðin — 100 m langur — verður liðugur í august mánaða.

Táið havnaarbeiðini verða liðug á Tvöroyri verður talan um umleið 900 m atleggingarpláss á Tvöroyri og á Drelnesi. Her eru privatar bryggjur sum á Hvítanesi ikki tiknar við.

Saaby & Lerke hava tikið havnaarbeiði í Vági at gera í fastari rokning.

Sjúkrahúsið á Tvöroyri sigst at koma at kosta um 2,5 mill. Farið verður nú undir at byggja leikfimishús fyri yvir 300.000 kr. Nútímans svimjibrunnur verður bygdur inni í húsinum.

Menn eru við at innseta nýtt nútímans bakarí í hjallarin á handilshúsum Joen Nolsöes. Tað sigst, at Peter Mortensen og aðrir arvingar til Hvítanes eru ánararnir.

A. T. fyrireikar eisini bygging av nýggjum bakarí.

Táið hesi bakarí eru gjörd verða ikki minni 5 bakarí á plássinum, ið so statt ikki nýtist at tróta bakkilsi.

Rankin hevði fingið 125 ton í fjúrtan dagar.

Brimnes boðar frá góðum fiskiskapi í Grönlandi.

Vörðan er við at vera fullfermd við Bjarnaoynna.

Úr Porkeri.

Fiskimannafelagsformaður Danbjörg hevur starvast fyri samrenning av arbeiðsmannafelögum og fiskimannafelögum í Föroyum til ein heildarbul, ið skal vísa, at arbeiðaraklasans frígering er arbeiðaranna egna verk.

Høvdaberg er við at vera fullfermdur eftir stutta fiskitíð.

Góð tíðindi frá skipunum í Grönlandi.

Trolararnir Rádni og Beinisvör hava fiskað óført í ár. Beinisvör siglur fullur heim. Rádni fór til Grønlands aftaná at vera heimkomin við 240 tonsum úndan Bjarnaoynni.

Ikki arbeiði, men arbeiðfólk trýtur í stórum.

TØKK

Hjartaliga takki eg öllum í bygd og av bygd; ið við gávum telegrammum og á annan hátt heiðraðu meg á sjeyti-ára degi mínum.

JUST JUSTESEN,
Norðdepli.

BÝRÁÐIÐ

ger her kunnigt, at eingin býráðsfundur verður týsdagin 25. juli í ár.

Tórshavnar býráð,
tann 12. juli 1950.

PANTING

Tað verður her gjört kunnigt, at dómarin hevur gókent at eftirstøður av kommunuskatti, kaminreinsan og vatngjaldi fyri fyrra hálvár h. á. verða innheimtaðar við panting.

Farið verður undir pantingina uttan aðra ávarðing tann *7. august h. á.*

Tórshavnar býráð,
tann 12. juli 1950.

Telefongentur

2 gentur kunna fáa pláss á telefonstöðini í Havn. Umsöknir verða at senda til

Telefonverkið

EMBÆTI SUM TÆNASTUMAÐUR LANDSINS

Embæti sum fyristöðumaður fyri útskiftingar- og matrikulskrivstovuni er ósett frá 1. august 1950.

Lönin er: Grundløn 6.000 kr. árliga, hækkandi eftir 5 árum til 6.600 kr. Afturat grundlønini verður latið eftirlöngevandi viðbót og aðrar viðbötur eftir galdandi reglum, og sum hesar mátti verða broyttar.

Treyt er, at avvarandi er landinspektørur.

Umsóknir við avritum av prógvskjølum og möguligum viðmælum mugu vera landsstýrinum í hendi seinast 1. august 1950.

Føroya Landsstýri, 6. juli 1950.

Ungdómstevna á Eiði

Um Gud vil verður summarstevna á Eiði í døgunum 19. — 26. juli.

Tann, ið ikki veit sær innivist, biðist venda sær til Ole A. Ellinsgaard á Eiði innan 16. juli.

Öll eru vælkomin.

Talarar verða prestar, trúboðarar og onnur leikfólk.

Fyri ungdómsstevnuna

Ole A. Ellingsgaard, Eiði.

Alfred Petersen, Klakksvík.

M-S Dronning Alexandrine

Af Hensyn til Bygdepassagererne meddeler Det forenede Dampskibs-Selskab i Dag, at »Dronning Alexandrine«s Afrejse hveranden Mandag til København fremtidig vil blive udsat til senest Kl. 12 Middag.

D.F.D.S.' Ekspedition i Thorshavn.

ÓLAVSØKU-KAPPRÓÐUR

Í kappróðrinum á Ólavsöku luttaka:

4-mannaför.....(dreingir 13-15 ár)
6 — —.....(dreingir 16-18 ár)
4 — —.....(kvinnur)
6-,8- og 10-mannaför (menn) sum vanligt.

Tey, sum vilja luttaka, eiga at melda seg áðrenn 24 juli.

Havnar Róðrarfelag, tlf. 406

Menn

søkjast til framhald av havnararbeiðinum. Áhugaðir snúgvi sær beinleiðis til okkara. Innivist kann útvegast.

Havnar arbeiðsmannafelag. tlf. 554

LANDSBÓKASAVNIÐ

og forngripasavnið, verða vegna umvælingararbeiði afturlatin frá 14. juli til 6. august.

NØTU-KOKS,

serstakliga hóskandi til Aga-komfýrar, Esse-komfýrar og Esse-ovnar.

Arbeiðsmannafelags kolasøla.
Telefon 405